# Havnar Bio

kall Coca-Cola




**Sin City**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 29.07 | kl. 23.30 | |
| Leygardag | 30.07 | kl. 23.30 | |




**Valiant**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 28.07 | kl. 16.30 | |
| Fríggjadag | 29.07 | kl. 16.30 | kl. 18.30 |
| Leygardag | 30.07 | kl. 16.30 | kl. 18.30 |




**Batman Begins**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 28.07 | kl. 21.15 | kl. 23.30 |
| Fríggjadag | 29.07 | kl. 18.45 | kl. 20.45 |
| Leygardag | 30.07 | kl. 21.30 | kl. 23.59 |




**A Lot Like Love**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 28.07 | kl. 18.30 | kl. 21.00 |
| Fríggjadag | 29.07 | kl. 21.30 | kl. 23.59 |
| Leygardag | 30.07 | kl. 21.30 | kl. 23.59 |




**Bøllebob og Smukke Sally**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 28.07 | kl. 17.00 | |
| Fríggjadag | 29.07 | kl. 17.00 | |
| Leygardag | 30.07 | kl. 17.00 | |




**Hostage**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 28.07 | kl. 23.59 | |




**Sahara**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hósdag | 28.07 | kl. 18.45 | |

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**


Tv Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

# High Fidelity

**Á Tv3 leygarkvøldið kl. 21.00**



*John Cusack og danska sjónleikarinnan Iben Hjejle í "High Fidelity", ein skemtilig og romantisk søga eftir heimskenda høvundanum Nick Hornby*

Rob er miðskeiðis í 30unum, tónleikarnørdur og eigari av plátubúðini Championship Vinyl. Hvønn dag, fleiri ferðir um dagin ger Rob topp-5 listar yvir alt, yvir tónleik, arbeið og so kærleikssorgir. Og nú er daman, Laura, farin frá honum. Kreppa ger um seg, og eingin meining er við lívinum longur. So fer hann eftir topp-5 listanum yvir tær ringastu kærleikssorgirnar í lívi sínum. Hann vil hava greiðu á, hví tað sama mynstrið endurtekur seg hvørja ta einastu ferðina hann involverar seg í kærleiksforholdum. Hann vil, í øðrum orðum, - og fyri at brúka ein metafor úr plátubúðini - vit, hví lív hansara koyrir í somu skering. Fyrrverandi damurnar hjá sær kunnu kanska peika á nøkur mistøk og peika á trupulleikar hjá Honum, men fær hann Laura aftur á hendan háttin? Tað mesta av filminum fer annars fram í plátuhandlinum hjá Rob. Her starvast tónleikaentusiastar av grovasta slag - hetta er teirra andaliga kall, at starvast við tónleiki. Um teir ikki dáma viðskiftafólk, ið vitja handilin, so selja teir teimum einki. Teir gera alt fyri at teirra høgt virdi og elskaði tónleikur endar í røttum hondum. Og ein stórur partur av arbeiðsdegnum fer við at gera topp-5 listar yvir allan møguligan tónleik.



*Í plátubúðini hjá Rob arbeiða tónleikaentusiastar av grovasta slagi. Um teir ikki dáma viðskiftafólkini, royna teir at sleppa sær við hesi sum skjótast*

# Skúlamaturin hjá Jamie

**Á TvDanmark mánakvøldið kl. 19.00**



*Jamie Oliver er sannførdur um, at skúlabørn í Onglandi fáa ósunnan mat. Hann nevnir t.d., at børnini á Kidbrooke skúlanum í Greenwich eta eitt kvart tons av kipsi um vikuna*

Nýggj røð við super-kokkinum Jamie Olivier byrjar 1. august. Hesaferð ætlar hann at gera mat til 20.000 skúlabørn í kant-inum kring allan London. Hann ætlar somuleiðis at gera eina mataræltan, ið myndugleikar og skúlar yvir alt Ongland kunnu fylgja. Jamie Oliver hyggur fyrst eftir, hvat børn og ung eta í skúlanum, hvussu maturin



*Nýggj røð við energiska super-kokkinum Jamie Olivier byrjar 1. august á TvDanmark, kl. 19.00*

verður tilgjørdur, hvussu maturin kann gerast betri - og so hvussu mann í roynd og veru ger mat til hund-raðtals næmingar. Hann prátar við næmingarnar og tey, ið gera mat og fyrireika matgerðina. Høvuðsenda-málið er at betra um góðsk-una á matinum, soleiðis at junkfood og grillmatur verður settur til viks, og í staðin, at sunnari og orku-ríkari matur kemur á borðið - t.d. thai-matur og fiskur. Jamie Oliver er nevniliga sannførdur um, at skúlabørn í Onglandi fáa alt ov ósunn-an mat. Hann nevnir t.d., at børnini á Kidbrooke skúlan-um í Greenwich eta eitt kvart tons av kipsi um vikuna! Jamier er illa við av matmentanini hjá fleiri av børnunum. Fleiri av teimum duga ikki at eta við gafli og knívi, tí tey eru von við skjótt gjørdan mat. Sendi-røðin tekur um endan á einum álvarsomum og við-komandi kjaki um føðslu og yvirvekt, atburð, innlæring, matvørugóðsku og ikki minst um, at enska stjórnin skal føra ein greiðan heilsupolitikk, ið tekur atlit til sambandið millum næm-ingarnar og matin, ið teir eta á skúlunum. Jamie vil vera við, at tað eru fimm týðandi avbjóðingar, ið enska stjórn-in skal gera nakað við í ensku skúlakantinunum: stjórnin skal syrgja fyri, at heilsugóður matur kemur á talerkin hjá øllum næming-unum; seta kveikjandi og heilsustyrkjandi krøv til matgerðina; investera í starvsfólki til skúlakantinur; læra børn um sunnan mat og tryggja, at fleiri pengar verða settir av til skúlamat á fíggjarlógini.

## Filmsyvirlit hesa vikuna

Gangs of New York; TV1000 Fríggjadag 29. kl. 19.00
Girl with a Pearl Earring; Canal+ Film 1 Fríggjadag 29. kl. 20.00
Mannajagstran; TCM Fríggjadag 29. kl. 20.00
Agent 007 í hennara hátigns loyniligu tænastu; Dr1 Leygardag 30. kl. 19.40
Pulp Fiction; TV 2 zulu Leygardag 30. kl. 19.55
The King is Alive; Dr2 Leygardag 30. kl. 21.50
Kiss of the Dragon; Tv3 Sunnudag 31. kl. 20.00
Lolita; Dr2 Mánadag 1. kl. 18.50
Resident Evil; Kanal 5 Mánadag 1. kl. 20.00
Hanging Up; Tv3 Mánadag 1. kl. 20.00
Ringanna harri: Kongurin kemur aftur; Canal+ Týsdag 2. kl. 21.00
21 gram; Canal+ Mikudag 3. kl. 18.25
The Mapmaker; Hallmark Hósdag 4. kl. 21.45